gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Fingu ikki nógv at vita

**–Enn er ikki vist, um kommunurnar sleppa at byggja meiri út næsta ár, enn tær kunnu byggja fyri í ár**

KOMMUNULAR ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*

Tað kom ikki nógv nýtt fram á fundinum ímillum Fíggjarmálastýrið og Kommunusamskipan Føroya í farnu viku.

Partarnir høvdu fund í Suðuroy í farnu viku at tosa um, hvussu nógv kommunurnar kundu byggja út fyri komandu ár.

Í Kommunuskipanini eru tær seks býarkommunurnar í landinum og tær vilja fegnar byggja meiri út komandu ár, enn tær sleppa at byggja út fyri í ár.

Fíggjarmálastýrið hevur ásett, at í ár kunnu kommunurnar byggja út fyri tilsamans 180 milliónir. Handan upphæddin verður so býtt sundur ímillum teir einstøku kommunurnar eftir fólkatalinum.

Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipanini sigur, at á fundinum í farnu viku gjørdi Fíggjarmálastýrið greitt, at komandi ár bleiv karmurin ikki stórt hægri enn hann er í ár. Sostatt kunnu kommunurnar heldur ikki næsta ár vænta at sleppa at byggja út fyri meiri enn einar 180 milliónir.

Hetta er eitt haft um beinið á fleiri kommununum, tí tær hava bæði ráð og tørv á at byggja meiri út, enn tær sleppa undir treytunum, sum nú eru.

Kommunusamskipanin hevur tí skotið upp, at havnarbygging verður tikin burturúr karmunum, so at kommunurnar kunnu byggja havnir afturat teimum 180 milliónunum.

–Havnarútbyggingar eru rættiliga dýrar og hevði tað borið til at lagt tær út um karmin, hevði tað verið ein stórur bati, sigur formaðurin.

Jógvan Krosslá sigur, at á fundinum fingu kommunurnar onki beinleiðis svar frá Fíggjarmálastýrinum.



*– Ætlandi sleppa kommurnar heldur ikki næsta ár at byggja út fyri meiri enn 180 milliónir, men tað royna kommunurnar nú at fáa broytt, sigur Jógvan Krosslá, formaður í Kommunusamskipan Føroya*

–Fíggjarmálastýrið hevði fyrst og fremst ætlað at hoyra okkara sjónarmið og tað fingu teir so høvi til.

Hann væntar, at svar kemur aftur frá landsstýrinum í næstu framtíð.

# Skulu loysa nógv mál upp á stutta tíð

**Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið skulu samráðast um fleiri viðurskifti, sum skulu fáast í rættlag, áðrenn farið verður í summarfrí**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*

Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið koma at síggja nógv til hvørt annað teir komandu dagarnar.

Tey bæði hava nevniliga fleiri mál at samráðast um, áðrenn farið verður í summarfrí.

Talan er um ymisk viðurskifti, sum koma í gildið komandi skúlaár og sum sostatt skulu vera avgreidd fyri 1. august.

Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Lærarafelagnum sigur, at samráðast skal um, hvussu limirnir hjá Lærarafelagnum í teimum nývaldu skúlastýrunum skulu lønast. Samstundis skal samráðast um, hvussu limirnir hjá Lærarafelagnum, í námsfrøðiliga ráðnum, skulu lønast.

Harafturat skulu partarnir eisini samráðast um, hvussu teir nýggju KT vørðarnir í skúlunum skulu lønast.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag væntar ikki, at trupulleikar fara at standast av samráðingunum um skúlastýrini og námsfrøðiliga ráðið, sum avloysir Lærararáðið

Hinvegin heldur hon, at samráðingarnar um KT-vørðarnar kunnu gerast tyngri.

–Tann nýggja KT-varðaskipanin, sum kemur í gildi 1. august, er ein rættiliga dýr skipan. KT vørðarnir skulu lønast eftir, hvussu stórir skúlarnir eru, tvs, hvussu nógvir lærarar og næmingar eru í skúlanum og, hvussu teldur eru í skúlanum.

– Hetta er ein skipan, sum krevur rættiliga nógv arbeiði og tí krevur KT varðaskipanin nógvar tímar og hampiliga stóra játtan.

Ein bólkur við tveimum umboðum úr Mentamálastýrinum og einum umboðum fyri Lærarafelagið hevur gjørt eitt álit um, hvat arbeiðið hjá KT vørðunum skal fevna um, og, hvussu teir skulu lønast. Sostatt eru Mentamálastýrið og Lærarafelagið samd um, hvussu KT vørðarnir skulu skipast.

Hetta álitið er latið Fíggjarmálastýrinum og Elsa Birgitta Petersen vónar, at Fíggjarmálastýrið tekur undir við álitinum frá Mentamálastýrinum og Lærarafelagnum um, hvussu KT vørðarnir skulu lønast.

Elsa Birgitta Petersen er kortini eitt sindur ørg um, at tað gongur so strilti at sleppa á fund við Fíggjarmálastýrið.

– Fíggjarmálastýrið hevur so nógv at gera, eitt nú við samráðingunum um Teistan og onnur mál, at stundir eru ikki til at samráðast við okkum. Og tað kann koma aftur um brekku í seinasta enda, tí hetta skal alt vera avgreitt fyri 1. august.

# Halda fast um umbering fyri Torbjørn Jacobsen

UMBERING
*Áki Bertholdsen*

– Tað, sum embætisfólkini í mentamálastýrinum segði, kundi ikki skiljast øðrvísi, enn, at tað var ein umbering.

Føroya Lærarafelag tvíheldur um, at embætisfólkið í Mentamálastýrinum hevur biðið um umbering fyri atburðin hjá Torbirni Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismanni, á tí tiltikna fundinum við leiðsluna fyri Vestmanna Skúla, sum endaði við, at leiðslan rýmdi av fundi.

Eftir, at forkvinnan í Lærarafelagnum segði í samrøðu við Sosialin í farnu viku, at tey høvdu fingið umbering, hálvgun avsannaði leiðarin í Mentamálastýrinum fyri fólkaskúlan, Hensar Ellingsgard, tað í útvarpinum.



*– Vit ivast ikki í, at tað var ein umbering, vit fingu. Og nú hevur Mentamálastýrið tvær ferðir biðið um umberingfyri atburðin hjá Torbjørn Jacobsen, sigur Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Lærarafelagnum*

Sambært útvarpinum segði Hensar Ellingsgaard, at embætisfólkið hevði ásannað, at landsstýrismaðurin leyp framav, men eina umbering vildi hann ikki kalla tað.

Men hjá Lærarafelagnum er ongin ivi.

Elsa Birgitta Petersen sigur, at tey hava ikki bara fingið eina, men tvær umberingar frá embætisfólkunum í Mentamálstýrinum. Fyrra umbering kom á fundi millum Mentamálastýrið og Lærarafelagið. Seinna umberingin kom á fundi millum Mentamálastýrið, leiðsluna fyri Vestmanna Skúla og umboð fyri Lærarafelagið.

–Á teimum báðum fundunum fullu orðini hjá Hensar Elingsgaard soleiðis, at tey kunnu ikki skiljast øðrvísi, enn at talan var um eina umbering, sigur forkvinnan í Lærarafelagnum.

Sostatt hava bæði leiðslan fyri Vestmanna Skúla og Føroya Lærarafelag fingið umbering frá embætisfólkunum í Mentamálstýrinum.

Hionvegin heldur Torbjørn Jacobsen í samrøðu við Sosialin leygardagin, at at tað er ongin orsøk at biðja um umbering og at ongin skal biðja um umbering hansara vegna

–Tað havi eg onga viðmerking til, sigur forkvinnan í Lærarafelagnum.

Annars endurtekur Elsa Birgitta Petersen, at tað, sum hendi á fundinum ímillum Mentamálastýrið og Vestmannaskúla, hevur fingið tað til avleiðing, at fyribils skal Lærarafelagið vera hjástatt á øllum fundum millum umboð fyri føroyska fólkaskúlan og Mentamálastýrið.

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Stavanger ynskir samstarv

**Tað var ein væl mannað sendinevnd úr Stavanger, sum møttu pørtum av føroysku fjølmiðlunum hósdagin í síðstu viku. Niðurlagið var, at Stavanger er meira enn áhuga fyri samstarvi.**

*Heri á Rógvi*
*Myndir Jan Müller*

Klokkan var farin um fimm seinnapartin hósdagin, tá ein ótolin borgarstjóri royndi at savna fólk sum frægast inni í Býráðssalinum. Inni í salinum hómaðist eisini ein lítil minniluti, sum hevði føroyskt sum móðursmál. Hóast kallað varð til tíðindafund var meginparturin av føroysku pressuni ikki til steðar. À skránni stóð framløga frá umboðum úr Stavanger í Noregi. Tað vóru heldur ikki lítið av fólki úr Stavanger, ið vóru til staðar í Býráðssalinum. Hesi umboðaðu bæði tað privata og tað almenna. Á odda fyri fylginum stóð sjálvur borgarstjórin í Stavanger, Leif Johan Sevland. Hesin sami legði dent á serliga tvey ting. Eitt var eitt samstarv, sum kundi mint meiri um eitt vinarbýarsamstarv, og hitt var eitt samstarv í sambandi við eina komandi oljuvinnu í Føroyum. Norðmenn meta Tórshavn og Stavanger at vera rættiliga lík, hóast tað, at oljuvinnan er trýati ár frammfyri í Norra.



*Borgarstjórar hittast. Jan Christiansen hittir norska starvsfelagan Leif Johan Sevland.*



*Borgarstjórin í Stavanger, Leif Johan Sevland greiðir frá.*

## Læra av royndunum

Sum áður nevnt, so vísti Leif Johan Sevland á, at Tórshavn og Stavanger kundu samstarva á nógvum ymiskum økjum. Tað, sum Leif Johan Sevland hevði sum grundarlag undir sínari framløgu, var, at Stavanger hevði royndir frá einum oljuævintýri, har Tórshavn, eins og restin av Føroyum kunnu gera sær dælt av teimum royndum – báði við góðum og minni góðum fylgjum – sum Stavanger hevur gjørt sær. Stavanger er í dag at kalla miðstaður fyri oljuvinnuni í Norra, og hevur tað verið talan um ein rættiliga stóran framburð, síðani oljuvinnan byrjaði har um leiðir miðskeiðis í sekstiárunum. Leif Johan Sevland vísti á, at Stavanger er vorðin ein rættiliga nútímans býur, og hetta skyldast í stóran mun oljuvinnuni. Samstundis segði Leif Johan Sevland, at Stavanger, eins og at kalla øll oljuvinnan í Norra, ikki hevði kunnað fingið glið á eina tílíka vinnu uttan við kønari hjálp uttanífrá. Tað er eisini henda hjálp, sum vinnan úr Stavanger, eins og tað almenna, eru klár til at veita føroyingum. Leif Johan Sevland vísti á, at oljuvinnan er ein stór og oftani rættiliga umfatandi vinna, og tað standast nógv árin av hesari vinnugrein. Eitt nú nevndi hann, at tað framvegis búgva lutfalsliga nógvir útlendingar í Stavanger.

Á samkomuni hósdagin talaði Leif Johan Sevland heitt fyri, at samstarv skal fáast í lag millum Stavanger og Tórshavn. Hann vísti eisini á aðrar fyrimunir við einum tílíkum samstarvi, t.d. innan skúlaverkið. Ì øllum førum var talan um eina rættiliga sjarmuoffensiv, har hann tó megnaði gløgt at halda bæði beinini á jørðini.

## Fyritøkurnar klárar til føroyska marknaðin

Á samkomuni hósdagin vóru eisini umboð frá nógvum fyritøkum og stovnum úr Stavanger. Hesi umboðaðu fyri tað nógva virki, sum hava tilknýti til oljuvinnuna. Hesar fyritøkur fáast mest við at vera veitarar av tænastum ella vørum til oljuvinnuna. Tað er greitt, at oljuvinnan inniheldur nógvar hjávinnugreinir, sum gera oljuvinnuna risastóra og almikið umfevnandi.

Millum fyritøkurnar, sum vóru umboðaðar á samkomuni hósdagin, kann nevnast Møkster Shipping AS, sum eigur og rekur skip í sambandi við oljuvinnuna. Henda fyritøka er vaksin til at vera ein risastór fyritøka, og hava teir hesa seinastu tíðina lagt seg eftir serliga supplyskipum. Fyritøkan er eitt dømi um eina norska fyritøku, sum er vaksin nógv síðani oljuvinnan kom, og hevur ment seg so mikið nógv, at hon í dag er at meta sum altjóða fyritøka.

Allar fyritøkurnar, sum vóru umboðaðar á samkomuni hósdagin, søgdu seg vera sera áhugaðar at koma inn í eina komandi føroysku oljuvinnu. Fleiri av hesum fyritøkum hava eisini nýtt høvið til at vitja líknandi fyritøkur í Føroyum. Jan Christiansen, býráðsformaður, segði, at hann metti áhugan hjá hesum fyritøkum vera positivan, og sannaði samstundis at talan er um »business«, sum hann tók til.

Eisini vitjaðu umboð fyri hægri læristovnar. Hesi hava eisini í ein ávísan mun eitt samstarv við Fróðskaparsetrið, og ynskja eisini at menna hetta samstarv.

Í øllum førum trýtur ikki við áhuga fyri Føroyum úr Stavanger, við atliti at Tórshavn og einari komandi oljuvinnu.



*Við í Føroyum eru eisini skúlafólk, sum arbeiða í oljuvinnuni, her eitt nú skúlanum fyri børn og ung hjá útlendskum oljuarbeiðarum. Eisini norðmenn, sum lata næmingum á Setrinum eina hjálpandi hond*

# Mælir til oljuráðlegging í høvuðsstaðnum

**– Tað er umráðandi hjá Tórshavnar Kommunu at vera til reiðar at taka ímóti oljuvinnu. Tá kann væl fáast burturúr. Eru vit ikki til reiðar, kann skaðin vera óbøtandi fyri býin og fólkið, sum her býr sigur Jógvan Arge, býráðslimur**

OLJURÁÐLEGGING
*Jan Müller*



*Jógvan Arge, býráðslimur mælir býráðnum til at seta oljuráðleggingarnevnd, um olja verður funnin*

Nú oljuvinnan nærkast hevur býráðslimurin, Jógvan Arge (tjóðvfl.) mælt Jan Christiansen, borgarstjóra til at seta eina oljuráleggingarnevnd. Í brævi til borgarstóran mælir Jógvan Arge býráðnum til at samtykkja at seta eina oljuráðleggingarnevnd fyri Tórshavnar Kommunu.

Setningurin hjá nevndini skal vera at útgreina ta gongd og tann tørv, sum verður í Tórshavnar Kommunu, um olja verður funnin undir Føroyum.

– Vit vita, at kemur oljuvinnan í gongd í Føroyum, fer hetta at fáa stórt árin á lívið á landi. Væntast kann, at væl av fólki flytur higar, og meginparturin fer at seta seg niður í Havn ella í Tórshavnar Kommunu. Higar verður eisini størri ferðsla, bæði sjóvegis, yvir land og loftvegis skrivar Jógvan Arge og heldur fram:

– Hetta fer aftur at leggja trýst á Havnina og fer at krevja bústaðarmøguleikar, barnagarðar, vøggustovur, skúlar, gistingarmøguleikar, ráðstevnumøguleikar, matstovumøguleikar, stuttleikamøguleikar, havnarmøguleikar o.m.a.

Tað er í tøkum tíma hjá Tórshavnar Kommunu at seta eina tílíka útreiðing í verk. Til tess at stíla fyri útgreiningararbeiðnum eigur Tórshavnar Býráð at samtykkja at seta eina oljuráðleggingarnevnd við politikarum og embætisfólkum, sum aftrat sær fær fólk burtur av at taka sær av praktiskum málum.

Jógvan Arge sigur víðari, at býráðið skal gera arbeiðssetningin hjá ráðleggingarnevndini og játta pening til arbeiðið, ið má setast í verk beinanvegin.

Ráðleggingarnevndin eigur at hava møguleika at fáa sær serkøna hjálp á teimum økjum, har tað er neyðugt. Miðað eigur at verða eftir, at fyrstu tilmælini ella ávegis tilmæli frá nevndini verða tøk í hesum ári.

Skotið verður upp, at hetta mál verður sett á dagsskránna hjá Tórshavnar Býráð á fyrstkomandi býráðsfundi. Krevst nevndarviðgerð fyrst, verður mælt til, at málið verður beint til viðgerðar í nevndum, sum eru relevantar.

– Tað er umráðandi hjá Tórshavnar Kommunu at vera til reiðar at taka ímóti oljuvinnu. Tá kann væl fáast burturúr. Eru vit ikki til reiðar, kann skaðin vera óbøtandi fyri býin og fólkið, sum her býr sigur Jógvan Arge, býráðslimur í viðmerkingunum til uppskotið.